# ABC samgongan skal ikki sleppa at lóggeva arbeiðarfjøldina niður í løn

ANNITA Á FRÍÐRIKSMØRK



**Lóggevur ABC samgongan arbeiðarafjøldina niður í løn, gera tey seg inn á sáttmálafrælsi, inn á arbeiðarafjøldina og inn á gjørdar avtalur**

Hóast hesa inngerð, er onki, sum tíðir uppá, at tað er skilagott fyri føroyskan búskap at forða fyri lønarhækkan. Tað er hinvegin rein maktmisnýtsla av samgonguoddamonnum, tá hesir nú, hótta við at lóggeva seg burturúr gjørdum avtalum, sum somu menn hava gjørt við fakfelagsrørsluna.

Fyrru ferð var royndin hjá Jóannes Ejdesgaard, tá ið hann í summar royndi at samráða seg fram til ein lønarsteðg. Tað stríðið tapti hann, og hildu vit, at ABC viðgekk tapið. Men nei, nú tey eru komin fyri seg aftur eftir ólavsøkupakkan, og fíggjarlógin er til viðgerðar, verður tað stríðið uppafturtikið. Nú við løgmanni á odda og varaløgmanni í hølunum.

Tey mugu vísa samhaldsfesti, sigur løgmaður, og varaløgmaður hóttir við at koyra tey niður í løn við lóg.

Vælsignaði latið handan sáttmálan fáa frið. Hann er søguligur, hann er fimm ára langur, og hann hóttir ongan búskap. Hann økir um lønirnar við 60 mió. Millum ein triðing og eina helvt kemur inn aftur í landskassan sum skattur, og nógv av tí, sum tá er eftir kemur inn sum MVG og onnur avgjøld. At hótta við lønarniðurskurði skapar ótta, tað minkar um pengaumfarið, men ringast av øllum, so tekur tað alt álit burtur, sum hóast alt er millum politiska valdið og fakfelagsrørsluna.

Og løgmaður kann ikki bara hótta, hevur hann sagt A, má hann eisini siga B. Annars missa øll alt álit á løgmanni, eisini tey, sum hava álit á honum. Tað kann eg so ikki hava nakað ímóti, tí eg haldi, at hann og restin av ABC áttu at lagt frá sær. Men løgmaður er ikki bara ein av 49000 túsund føroyingum, hann er løgmaður og harvið maktfullasti maður í landinum, tí er tað ikki líkamikið, hvat hann sigur. Sigur løgmaður alment, enntá frá Løgtingsins røðarapalli, at fakfelagsrørslan skal niður í løn, og fær undirtøku frá næsthægsta manni, varaløgmanni, eisini frá løgtingsins røðarapalli, so kann fagfelagsrørslan av røttum rokna við, at tað er við slíkari lóggávu, sum ABC samgongna arbeiðir við.

Men, andstøðan er gott nokk ikki maktfullari enn samgongan, ikki á pappírinum. Men í hesum føri skulu tey fáa sína sak fyri, um tey gera álvara av ætlanum sínum at gera seg inn á fakfelagsrørsluna. Tjóðveldi fer so ongantíð at góðtaka at rørt verður við 3 ára sáttmálan. Vit eru til reiðar at verja manngarð um hasa avtaluna.

At lóggeva seg burturúr einum søguliga langum sáttmálanum, er fyri tað fyrsta búskaparliga óforsvarligt! Men tað sum verri er, so vil slík lóggáva forða fyri gagnligum sáttmálasamráðingum framyvir.

# Merkið til heiðurs og æru í tingsalinum

**Løgtingið hevur samtykt eitt upskot til samtyktar, um at Merkið skal virðast og hava hóskandi pláss í tingsalinum**

Løgtingið samtykti í gjár eitt uppskot til samtyktar frá Sjálvstýrisflokkinum um Merkið á Løgtingi.

Løgtingið tók undir við at Merkið skal standa á einum sjónligum stað í Løgtinginum. Við hesi samtykt hava øll Útnorðurlondini flaggið í tingsalinum. Flestu lond hava eisini fløgg síni í tjóðarhallunum.

Sjálvstýrisflokkurin vildi við uppskotinum vísa Merkinum og tjóðini, ið tað umboðar, størri virðing og meiri ásýniligt pláss í tingstarvinum.

**Í viðmerkingunum** til uppskotið vísti Sjálvstýrisflokkurin á, at Grannatjóðir okkara í Útnorði, Ísland og Grønland, hava tjóðarfløggini hangandi fremst í tingsalinum.

Eisini varð víst á, at Føroyar sanniliga hava havt sítt stríð til tess at vinna Merkinum viðurkenning, og at líka so vist er, at tjóðin í dag stendur sameind um at virða og vísa samleika sín við Merkinum.

Undir Merkinum savnast tjóðin, og flaggið er ímyndin um, at hóast hugsjónarliga ósamd ber tað til at standa saman og lyfta í felag umframt at finna loysnir, tá á stendur.

Tað var upprunauppskotið frá Sjálvstýrisflokkinum, sum bleiv samtykt, meðan broytingaruppskotið frá meirilutanum í Mentanarnevndini fall.

**Sjálvstýrisflokkurin**

# Manglandi hugflog

JÓNLEIF JOHANNESEN



Ferð eftir ferð hoyra vit at Sandoyartunnulin ikki kann fremjast í verki orsaka av pengaávum. Eg sakni hugflog í hesum kjaki. Eg vil vísa á tvær loysnir, sum geva sandoyartunnlinum í minsta lagi 42, 5 millónir krónur á hvørjum ári.

**Loysn 1**

Vit knýta Norðoya, Vága, Norðskála og Kollfjarða tunlarnar saman í eina skipan. Skipanin skal virka á tann hátt, at bilurin bert verður skrásettur einaferð um dagin. T.v.s. at tað kostar tað sama at koyra gjøgnum allar tunlarnar, sum tað kostar at koyra gjøgnum ein.

Síðani verða hesir tunlar samlaðir í eitt partafelag saman við Sandoyartunnlinum.

Við útgangsstøði í prísi og bilatali fyri Vága og Norðoyartunlunum, er ein veruleikakend meting, at nýggja partafelagið uttan trupulleikar kann hava eina inntøku á 100 milliónur krónur hvørt ár. 40 milliónur fara til Vága og Norðoyartunlarnar. Hinar 60 milliónurnar fara í fyrstu atløgu til Sandoyartunnilin.

**Loysn 2**

Vegskatturin hækkar við 170 krónum um mánan. Við 20.000 skrásettum akførum vildi hetta givið góðar 40 milliónur krónur meira í landskassan. Við útgangsstøði í samgonguskjalinum er í fyrstu atløgu rættast at lata hendan pening fara til Sandoyartunnilin.

Tað vísir seg at samfelagið Føroyar ikki megnar at lyfta íløgur í vegakervið við skattapeningi. Tí noyðast vit at rinda íløgurnar í vegakervið á annan hátt. Til hetta krevst eitt ávíst hugflog og at allir landspolitikkarar hugsa um alt Føroyaland.

# Viðmerking til tað sum løgmaður segði um fakfeløgini

HENRY OLSEN

formaður, Føroya Handverkarafelag

Tann 7. oktober langaði Føroya løgmaður út eftir fakfeløgunum á løgtingsins røðarapalli, tí tey ikki søgdu ja til lønarsteðg.

At ein løgmaður skal finna uppá at nýta tingsins røðarapall til at langa út eftir fakfeløgunum, tí tey krevja at fáa ta lønarhækking, sum tey hava samrátt seg fram til, tá tey gjørdu ein 3 ára sáttmála ístaðin fyri ein 2 ára sáttmála, fyri at tað skuldi vera friður á arbeiðsmarknaðinum, tað er undir alt lágmark.

Hesin sami løgmaður hevur tosað um at hjálpa teimum gomlu og vil geva fakfeløgunum skyldina fyri, at landskassin er misrøktur. Nei, hann skuldi heldur tikið í egnan barm og hugsa um skattalættarnar og aðrar ágóðar til fólk við hægri inntøkum, sum hann saman við restini av ABC samgonguni hevur givið. Tað eru ikki pensjónistar, sum hava brúkt pengarnar. Ei heldur eru tað fakfeløgini, sum hava skuldina. Tað eru tey skiftandi landsstýrini, sum sitið hava, ið hava søplað pengarnar burtur vegna innanhýsis klandur, har hvør hevur skavað sum mest til sín sjálvs og sítt øki ístaðin fyri at føra politikk, sum kundi koma øllum Føroya fólki til góðar.

Fakfeløgini hava víst samfelagssinni. Tíðin er komin til at landsins kosnu fólk eisini gera tað.

# ABC, - nú klúgva teir stórviðin

TÓRBJØRN JACOBSEN



Tað eru nakrar strukturellar orsakir til, at vit eiga eitt vælferðarsamfelag. Verri enn so allar eru naglafastar, hugsi um andaligu siðalæruna, borin frá ættarliði til ættarlið í øldir, tjóðskaparrørsluna, sum menti okkum mentanina, málið og viljan til at virka og liva á hesum útskerum í Europa og so fakfelagsrørslan, sum í sínum dialektiska leiki við og ímóti almenna og privata geiranum hevur ment samfelagið, og gjørt tað á leið livíligt hjá øllum at búleikast í samfelagnum. Alternativið hevði verið eitt fátækt jalladømi, ein ráðandi feudalur, har fá áttu mikið og dastið av populatiónini vóru ørandi fátæk bønarfólk.

Hetta er tjóðarinnar stórviður. ABC-samgongan hevur sett sær fyri at klúgva part av stórviðinum fyri at fáa javnvág og lív aftur í borgarligu verkætlanina, sett á lunnar í 2004, nú rakstrarhallið á heimastýrisins finansum setir søguligt met. Løgmaður og varaløgmaður hótta nú fakfeløgini, sum onki annað hava gjørt, enn at gera ein rímiligan og samfelagsbøtandi lønarsáttmála fyri fleiri árum síðani. Teir ætla at lóggeva ímóti eini sátt, sum teir sjálvir eru annar parturin av. Teir eiga valdið til tað, 20 av 33 tingmonnum stuðla teimum. Hetta er farið at líkjast støðuni, har fascistarnir taka valdið, og lata stríðsvagnarnar rulla út á gøturnar, skuldi onkur hættað sær at mutað ímóti.

Hetta er onnur syftan, har royndin verður gjørd at flyta fokus. Í hesum umfarinum. Fyrst tunnlar versus vælferð og nú ein lønarvøkstur á 60 milliónir krónur versus almennum rakstrarhallið, sum man fara at tátta í eina milliard, táið avtornar. Avmaktin guvar út ígjøgnum rimarnar á ABC-hjallinum. Hann er farin at líkjast larpasliga húsinum hjá H.C. Andersen, í "Ljóta Dunnuunganum", sum ikki datt niður, táið tað ikki fekk seg til at taka avgerðina um, á hvørja lið tað skuldi falla.

Fakfeløgini eru ikki trupulleikin. Politiska valdið er trupulleikin. Ella rættari valdið, sum ikki megnar at brúka givna ræðið frá fólkinum til at skipa samfelagið, soleiðis, at burðardyggleiki og javnvágir aftur fáast í rættlag. Skrivið frá fakfeløgunum er bara ein staðfesting av politiska veruleikanum. Hendan samgongan hevur onki annað gjørt, enn nartlað burturav hjá veikastu bólkunum í samfelagnum, og hon fær ikki annað, tí borgarliga kynið forðar teimum í at fara upp ímóti máttmiklu áhugamálunum í samfelagnum. Ongin bygnaðarbroyting er møgulig, táið valdið bara agerar alt eftir hvussu sterkasta lobby´in trýstur og sleppur politisku bøllingunum.

Er almenni parturin av samfelagnum vorðin ov stórur, tá er tað ein politiskur trupulleiki. Hetta er als ikki eitt fakfelagspolitiskt problem yvirhøvur. Skal almenni geirin trimmast, so ger man tað, og ivaleyst hevði ein djúptøkin skanning av almenna geiranum verið harðliga tiltrongd. Tað mæltu vit eisini til undir fíggjarlógarviðgerðini. Lopið haðan í frá, og til valdstekniskt at bróta arbeiðsmarknaðarsemjur, sum ein sjálvur er annar parturin av, tað er eitt frontalt álop á fólkaræðið. Bara tað, at tankin verður fostraður, átti at verið nógmikið til, at hesir kalarnir vórðu settir frá valdinum. Vit hava fingið eitt gýðingasyndrom, har ússaliga politiska valdsapparatið heldur sær sjálvum í sævarmálanum, við at brennimerkja ávísar bólkar í samfelagnum.

Nú ABC-menninir hava brotið alt innan úr húsinum, og brent tað á grúgvuni, eru teir farnir í holt við at klúgva stórviðin. Man stundin ikki verða komin til eitt politiskt síðaskifti, sum varðar av áhugamálunum hjá øllum í samfelagnum?